VIÐMERKINGAR

# BROT ÚR BRÆVI (V)

**Heri Mohr**



"….. Verkfallið um alt landið fer nú so við og við at visa sín álvara - og óhugna:

Matvøruhandlarnir eru so gott sum tømdir, olja og annað brennievni er ikki at uppdríva, skúlar, barnagarðar og vøggustovur lata aftur. Eingin reingerð og eingin varmi. Eg eri bangin fyri, at hetta verður eitt drúgt verkfall, tí einki fréttist um tingingar millum partarnar og semingsmenninar. - Tey, ið eiga bát og jørð, eru kanska frægast fyri, og teirra millum teljast vit. T.d. fáast ikki epli í nøkrum handli, men okkara frukt var so góð í fjør, at tað stendur ikki á. Vit hava nóg mikið av eplum til einaferð í heyst, tá ið nýggj frukt er komin undir lon. Pætur hugdi eftir okkara seteplum, og hann segði, at tey høvdu tað gott. Hann lovaði at hjálpa okkum at seta eplini niður í opinekruna inni í Dølum.

Ja, Jógvan, eg skal heilsa tær frá Pæturi, hann støkk inni á gólvið seinasta leygarkvøld, og hann bað meg sum sagt siga tær, at okkara setepli liggja í myrkri við sterkum nálum búgvin til at koma undir mold. Honum vant var hann prátingarsamur, og so líðandi gjørdist prátið okkara millum til einarøðu um mangt og hvat: - Malan, nú vit tosa um setepli, kann eg siga tær, at Sjúrður Skaale, -óivað tann sami, sum fyri nøkrum vikum síðan alment krøkti orð í mín munn, orð, sum eg ongantíð havi sagt ella skrivað,- skrivar nú, at 30% av okkum føroyingum kunnu sammetast við ein eplasekk, sum framburðssinnað dragsa aftan á sær. Men slík skriving (og tala) er sum tøð til eplasekkin, ið Sjúrður knógvar undir. Og at enda gerst sekkurin so stórur og tungur, at tey "framburðssinnaðu" fáa slysni, og í ovur- sinni leggja tey hann frá sær. Tað er óivað satt, tað hann skrivar um eplasekkin, men eplum líkt, so verða tey sett niður og geva góða frukt. Og lov og tøkk fyri tað.

Hatta vóru so eplini, verri er tó statt við umsitingini av landinum. Sjúrður vil vera við, at syndarliga er gingið av skriðuni hjá teimum "framburðssinnaðu". Snøgt sagt eingin glotti framman fyri stavn. Har grør ikki um gangandi fót; ósemja og kegl sum í orrustuni í Klandursskoti. Illgresi av versta slag má skrikkjast upp við rót: nepotisma, korruptión, vina- og kenningapolitikkur, og hann kundi fyri tað tikið lygnina við, tí hon er sjálvt gróðrarlendið, har slíkt ókrút ger um seg og køvir tann góða gróðurin. Men hetta liggur so langt frá okkara rótfestu gomlu mentan, at fólk við vanligum viti og skili als ikki fata, hvussu føroyingar "við felags lagnu og felags blóði" koma í slíkar myrkursins blindgøtur. Og kortini! Ein uggi er tað, at í lívgevandi morgunroða gerast hesar gøtur gráir og deyðir skuggar.

Albert Camus, sum skrivaði upprit í 25 ár, - tey vórðu funnin eftir hansara deyða í 1960 - skrivaði í august 1937, tá nationalisman - erkapestin, fyri at halda meg til terminologina hjá Stefan Zweig - leikaði ørt í Europa:

"Hvørja ferð eg hoyri eina politiska røðu ella lesi teir, ið ráða fyri borgum, so ógvist eg við í áravís ikki at hava hoyrt so mikið sum eitt ella annað menniskjaligt orð. Altíð tey somu orðini, tær somu lygnirnar. At fólk lata sær slíkt lynda, og at fólksins ónøgd ikki hevur avhølvað nikkidukkurnar, haldi eg prógvar, at menniskjuni halda, at teirra stjórnir hava lítlan ella ongan týdning, og at tey spæla - ja, tað er mín áskoðan - við ein stóran part av lívinum og sostatt við teirra sokallaða vitalu (lívsneyðugu) interessur". Annars havi eg ikki lisið Camus, ið var plágaður av tuberklum, nobelprísvinnari og doyði í ferðsluvanlukku.

Men nú skalt tú hoyra, Malan. Okkara yrkjari Jóanes Nielsen, ið hevur so lættan og skemtingarsaman penn, hevur roknað út, hvussu nógv páskahátíðin kostar tí tímalønta í mistum krónum og oyrum - jólahátíðini kemur hann kanska við seinni - og tann fastlønti hevur ongan pengamiss av okkara kristnu siðvenjing. Men hvussu við sunnudegnum, hesum sjeynda degi, sum Jóanes vil vera við, at Føroyar ikki blivu skaptar á, teir eru hóast alt 52 um árið. Átti hann ikki at gjørt eina peningaliga sunnudagskalkulu?

Og nú, Malan, rosinan í pylsuendanum: Jóanes vónar, at føroysku fakfeløgini fara at geva út eitt leksikon a la Den Store Danske Encyklopædi. Tað fer at kostar nakrar milliónir, sigur hann, men tær koma inn aftur, heldur hann. Danska Encyklopædiin í 20 bindum varð gjørd og skrivað av 450 vísindamonnum, 3.500 spesialistum og 50 starvsfólkum í umleið 7 ár, og hon kostaði ótaldar milliónir. Hvussu milliónirnar hjá Jóanesi kunnu koma inn aftur við einum upplagi, skulu vit siga, upp á 15.000, er ikki lætt at rokna út. Nei, tú, har er yrkjarin flogin í so høgt, og jørðforbindilsið er dragnað. Ella kanska avdúkar yrkjarin her á ein besnissaðan hátt, hvat peningurin, hann fekk at skriva fyri frá tí almenna, skal nýtast til. Men annars eru míni ráð: På det jævne! På det jævne! Ikke i det himmelblå, - Jóanes. Livst so spyrst.

Í gjár legði lítil grind beinini suðuri í Húsavík. "Á, tann vælsignaða grind", segði Ketil. Var so heppin at bjarga mær eitt kók niðri á brúnni, men tit skulu fáa kókið frá mær, eg havi nóg mikið frá í fjør bæði saltað og fryst.

Áðrenn Pætur fór um midnátt, spurdi hann, honum vant, í tí hann reisti seg, um eg kundi gita sær eina gátu: Í Føroyum er tað bara eitt stað, har barometrið fer uppeftir ella niðureftir, alla aðrastaðni gongur barometrið upp ella tað fellur. Hvar er tað? - So fór hann, uttan at geva mær stundir at svara. Ein løgin snigil. Men eitt er vist: hann hugsar meira um tey, ið standa honum nær, enn um seg sjálvan.

Góði Jógvan, sum eg skrivaði fyrst í brævinum, so gleða vit okkum, og børnini telja dagarnar."

**Kærar heilsur frá**
**okkum 5**
**Kona tín**

# Tann erpni floksformaðurin

**Jóannes Eidesgaard**



**Sum vera man, so tynnist alt soð í hesum verkfalsdøgum, men tað átti tó ikki at forða Høgni Hoydal at ført seg meira mergjað og sakliga fram, enn hann gjørdi í hasi greinini, har hann boðaði frá, hvussu errin hann var av brøgdunum hjá Tjóðveldisflokkinum og Karsteni Hansen á arbeiðsmarknaðarpolitiska økinum.**

Lat meg taka nøkur brot burturúr hesi greinini hjá honum, sum viðvíkja mær sjálvum:

- royndin hjá Jóannesi Eidesgaard at spæla verkafólkavinur.....
- royndin at sláa partapolitiskt platt upp á nakað so álvarsligt sum eitt verklfall .....
- Jóannes Eidesgaard tosar aftur ósatt um hækkaðar útreiðslur hjá tí almenna......

Taka vit hetta seinasta fyrst, so viðgongur Høgni Hoydal, sum eisini rætt er, at útreiðslurnar eru munandi øktar seinastu fimm árini, tá hann kemur við einum longum lestri um, hvat pengarnir eru farnir til. Annars kunnu øll síggja hesi tølini við at kaga í almennu roknskapartølini ella fíggjarlógirnar. Alt liggur frammi á heimasíðuni bæði hjá Løgtinginum og Fíggjarmálaráðnum. Har var einki ósatt, harra Høgni Hoydal, tølini tala. Og tølini um nógv dýrkaðu umsitingina eru tíverri eisini røtt. Men tit sita við matkina og hava valt tað soleiðis, tað er tykkara val.

So var tað hetta, at eg skal hava roynt at sligið politiskt platt upp á støðuna á arbeiðsmarknaðinum.

Eg nevndi í míni grein nøkur viðurskifti, sum eg haldi Tjóðveldisflokkurin og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur taklað klossut, og er hetta prógv um vánaligt politiskt handalag. Og eg kann tí gott endurtaka tað einaferð aftrat:

1. Fyri tað fyrsta, at Karsten Hansen ikki longu sama dagin ella longu dagin eftir, at sáttmálin var gjørdur millum SEV og Maskinmeistarafelagið, skrivliga og alment boðaði frá, at hann ikki góðkendi hann.

2. Fyri tað næsta, at Karsten Hansen, tá fakfeløgini hava spælt út við samráðingarupplegginum og hava greitt frá, at júst sáttmálin millum SEV og Maskinmeistarafelagið var grundarlagið, tá kemur hann sum ketta upp í høvdatrog og sigur, at henda sáttmálan fór hann ikki at góðtaka. Tá hevði sáttmálin verið virkin í næstan seks vikur og brúktur sum grundarlag fyri í minsta lagi einari útgjalding. Ein ósemja á privata arbeiðsmarknaðinum nærkaðist eftir hetta við risafetum.

3. Fyri tað triðja, at sama kvøld, sum tíðindini bórust um, at semingsmennnir fóru at kalla partarnir innaftur til samráðingar, tá kemur Karsten Hansen í útvarpið og sigur, at verða atlit tikin til fíggjarligu útlitini í landinum, so skuldi eingin króna gevast í lønarhækking til feløgini í verkfalli. Ikki eiti á stuðli at geva arbeiðsgevarunum - og eitt ótrúliga vánaligt tíðspunkt at velja sær .

4. Fyri tað fjórða, at Karsten Hansen og Fíggjarmálaráðið eru beinleiðis orsøkin til fastlæstu støðuna hjá maskinmeistarunum og Fiskiveiðieftirlitinum. Maskinmeistarafelagið hevur síðan 2001 ferð eftir ferð biðið Fíggjarmálararáðið um at fáa eftirlønarviðurskiftini endaliga upp á pláss, eftir at maskinmeistararnir á vaktarskipunum gjørdist tænastumenn. Man ønti teimum ikki aftur og enn minni boðaði teimum til fundar. Hóast tænastumannaskipanin júst byggir á álit millum partarnar, so niðurgjørdi Fíggjarmálaráðið hetta felag so nógv, at teir at enda kollektivt søgdu seg úr starvi. Restina av søguni kenna vit øll, men orsøkin liggur úti í glashúsunum á Argjum.

5. Sum tað fimta kundi eg nevnt greinina hjá formanninum í Unga Tjóðveldinum. Eg spurdi, um hetta var nýggja arbeiðsmarknaðarpolitiska linjan hjá flokkinum. Men tað svarið hava vit kanska fingið við lovsonginum frá formanninum henda dagin í bløðunum.

Vist er tað gott, at ein floksformaður er errin av politikkinum hjá flokkinum. Men í hesum førinum prógvar tað so bara tað, at Høgni Hoydal heldur, at henda manngongdin og hesin atburður hjá Tjóðveldisflokkinum og Karsteni Hansen er í lagi. Vit liva í einum fríum landi, so tað má hann gjarna halda, men eg og mong við mær halda so, at hetta er bæði klossut og prógv um eitt stak vánaligt politiskt handalag - og um tað var ætlað ella ei, so eisini ein uppíblanding.



# SEV rindar løn eftir gamla sáttmálanum

**Klæmint Weihe, stjóri í SEV, endurtekur fráboðanina um, at maskinmeistararnir hjá SEV fáa løn eftir gamla sáttmálanum, nú útgjaldingarnar nærkast**

SÁTTMÁLATRÆTA
*Stefan í Skorini*



*Stjórin í SEV, Klæmint Weihe, boðar enn einaferð frá, at maskinmeistararnir hjá felagsskapinum fáa løn eftir tí gamla sáttmálanum. Nakað, sum Maskinmeistarafelagið ikki vil góðtaka. Maskinmeistararnir fáa løn seinni í hesi vikuni*

Nú nærkast dagurin, tá maskinmeistararnir hjá SEV skulu fáa løn. Bíðað verður í spenningi eftir hesum degi, tí SEV hevur fleiri ferðir boðað frá, at maskinmeistararnir fáa løn útgoldna eftir tí gamla sáttmálanum.

Maskinmeistarafelagið hevur svarað aftur, at tað undir ongum umstøðum góðtekur at fara aftur til gamla sáttmálan. Spennandi verður tí at síggja, hvat stig Maskinmeistarafelagið fer at taka, tá lønirnar einaferð eru útgoldnar.

SEV og Maskinmeistarafelagið komu ásamt um ein sáttmála, sum hevur verið galdandi síðan 1. mars. Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum Karsten Hansen góðkendi tó ikki sáttmálan og mælti pørtunum at fara undir nýggjar samráðingar. Hetta vil Maskinmeistarafelagið ikki hoyra talan um.

## Einki annað val

– Vit fara at flyta lønirnar eftir tí gamla sáttmálanum. Vit hava ongan annan møguleika, tá sáttmálin ikki verður góðkendur í fíggjarmálaráðnum, sigur Klæmint Weihe, stjóri í SEV.

Mánadagin seinnapartin skuldu SEV og Maskinmeistarafelagið hava óformelt prát um støðuna. Fríggjadagin høvdu SEV og Fíggjarmálaráðið fund um støðuna, men einki nýtt kom fram á tí fundinum.

Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum, Jógvan Nybo, hevur áður nevnt møguleikan at leggja arbeiðið niður. Tað hevði havt við sær, at landið verður myrkalagt, tí motorarnir koyra ikki mannleysir.

Felagið bað um váttan frá SEV um, at felagsskapurin fór at halda seg til nýggja undirskrivaða sáttmálan, men hesum sýtir SEV fyri.

Hann sigur tó, at SEV fyrst av øllum fær at vita, hvat felagið fer at gera, tá lønirnar verða goldnar eftir gamla sáttmálanum.

Bjarga Norðsjónum:

# Burturkast á havinum hóttir fuglalívið

**Hollendingurin Jan Andries van Franeker er í Føroyum í hesum døgum og kannar innihaldið í maganum á havhesti. Trupulleikin er, at fuglurin etur nógv av tí plastikkburturkasti, sum verður tveitt í havið av skipum og bátum**

FUGLALÍV
*Stefan í Skorini*



*Nógv plastikk verður tveitt í havið, og havhesturin fær sær tað til matna. So nógv plastikk hevði eitt menniskja havt í maganum, um nøgdirnar og kropsvektin á havhesti og menniskjum verða samanbornar lutfalsliga*

*MYND: Jens Kr. Vang*

Londini kring Norðsjógvin eru farin undir eina felags verkætlan at kanna dálking av plastikkburturkasti, og hvussu hon ávirkar náttúru og djóralív. Verkætlanin nevnist Save the North Sea, og í hesum sambandi er hollendingurin Jan Andries van Franeker komin til Føroyar at kanna innihaldið í maganum á havhesti, hóast Føroyar liggja uttanfyri tað økið, sum verður kannað.

Jan Andries er við í einum kanningarliði, sum kannar havhestin í øllum londunum við Norðsjógvin. Hann hevur gjørt umfatandi kanningar av innihaldinum í maganum hjá havhesti í Hollandi, og úrslitini eru skakandi.

– Úrslitini hjá okkum vísa, at ein stórur partur av stovninum hevur stórar mongdir av plastikkburturkasti í maganum, sigur Jan Andries van Franeker.

Orsøkin til hetta er, at skip og bátar tveita nógv plastikkburturkast í havið. Havhesturin heldur, at hetta er føði og etur tað.

– Tað er sera vanligt, at manningin umborð á skipum tveitir burturkast av ymsum slag í havið. Eisini frálandavinnan sleppir sær eisini av við burturkast á hendan hátt. Trupulleikin er bert tann, at tað endar á strondini, og fuglar eta tað, sigur hann.

## Stórur skaði

Burturkastið kostar vinnulívinum milliónir av krónum hvørt ár, men tað, sum er meira álvarsamt, er árinið tað hevur á fugla- og djóralív.

Kanningarnar av havhesti í Hollandi vísa, at 96 prosent av fuglunum hava plastikklutir í maganum. Í miðal hevur hvør fuglur 22 pettir av plastikki onkustaðni í sodningarlagnum. Hetta svarar til 0,24 gramm av plastikki fyri hvønn havhest.

So illa stendur tó ikki til í Føroyum. Jan Andries hevur kannað havhest í Føroyum, og kanningarnar vísa, at føroyskur havhestur hevur munandi minni av plastikki í maganum. Nøgdin svarar til ein fimting av tí, sum havhestur í Hollandi hevur.

Verkætlanin (Save the North Sea) hevur til endamáls at minka um nøgdina á plastikki í Norðsjónum.

Hetta hevur sjálvandi stóra ávirkan á lív og heilsu hjá fuglinum. Fyri tað fyrsta kunnu plastikklutirnir blokera sodningarlagið hjá fuglinum. Í øðrum lagi kennir hann ikki svongd á sama hátt sum áður, tí plastikki liggur í maganum og gevur honum eina kenslu av at vera mettur.

Hetta hevur við sær, at fuglurin ikki er eins væl fyri kropsliga, sum hann kundi verið, og deyðiligheitin økist eisini nakað.

## Hóttir ikki stovnin

Jan Andries van Franeker sigur, at hendan dálkingin ikki beinleiðis hóttir stovnin, men um havhesturin verður fyri einum stórum hóttafalli, kann hetta hava álvarsom árin.

– Um dálkingin heldur fram á sama hátt sum nú, kann tað hava álvarsamar fylgjur, sigur Jan Andries.

Samanumtikið kann sigast, at dálkingin har suðri í Norðsjónum er munandi verri enn norðanfyri, tí at skipaferðslan er størri í hesum økinum.

Verkætlanin verður fíggjað av ES, sum letur av granskingarpengunum hjá felagsskapinum til at kanna árinið av plastikkburturkasti.



*Havhestur etur nógv plastikk, sum verður tveitt í havið av skipum og bátum, og tað ávirkar lív og heilsuna hjá fuglinum. Havhesturin í Føroyum er munandi betri fyri enn í teimum evropeisku strandalondunum*

*MYND: Jens Kr. Vang*